## Leggja alt í finaluna



Ein av orsøkunum til, at Stjørnan ikki fekk koppað VB var, at tær úr Vági ikki lótu seg lumpa av mansverjuni hesaferð.

Christina Holm ásannaði eisini eftir dystin, at hetta var nakað, sum tær høvdu vant í vikuni,.

– Tað var jú tað, sum kiksaði hjá okkum seinast, og tað hava vit so roynt at bøtt um, helt hon eftir dystin.

### Leggja alt í finaluna

Um týdningin av at koma í finaluna, helt Christina, at hesin dysturin nú var tann, sum tær hugsa mest um, tað sum eftir er av árinum.

– Møguleikan fyri FM hava vit so at siga sjálvar tveitt burtur. Tí er tað púra klárt, at tað er við stórum spenningi, at vit fara til finaluna.

– Hetta verður tó ein sera torfør uppgáva, og vit mugu onkursvegna bremsa VÍF spælinum, um tað skal eydnast okkum, men tað ætla vit okkum so undir øllum umstøðum at royna, segði Christina at enda.

Stjørnan–VB 23–25(12-13)

# VB fekk seinasta sessin

**VB ikki bara helt VB fast um leiðsluna, sum tær vunnu sær fyri viku síðani. Tær vunnu eisini útidystin í Klaksvík, og eru nú annað árið á rað klárar til finaludystin í steypakappingini**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Tá blást varð av, mundi fagnaðurin á VB liðnum ongan enda taka. Tær hava nú vunnið seg fram til steypafinaluna annað árið á rað*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Spenningurin var stórur, tá VB sunnudagin legði leiðina norður til Klaksvíkar. Seinni hálvfinaludysturin í Coca-Cola kappingini.

Fyrra dystin høvdu tær úr Vági vunnið við fimm málum, men tað er eingin loyna, at tær ikki vóru heilt tryggar við hesa leiðslu. Fyrst og fremst tí tær í teirri uppgerðini søplaðu eina 11 mála leiðslu burtur, og harumframt tí teir nú eisini vóru óneyðuga nógv skerdar, tí Gurið Mortensen fekk reytt kort í landskappingardysti, og tí ikki var við til seinnu hálvfinaluna.

### Gjørdu ov skjótt av

Fyrstu løtuna av dystinum var tó ikki líkt til, at VB lat seg merkja av trýstinum, sum lá á teimum undan dystinum.

Heldur var tað Stjørnan, sum lat seg merkja av hesum. Í royndunum at vinna tey fimm málini innaftur, settu tær frá byrjan nógva ferð á dystin. Kanska ov nógva, tí at líta til, var tað bert Vesna Tomajek, sum megnaði at fylgja við, tá tað ráddi um bóltførleika. Teimum fyrstu mongu málunum hjá heimaliðnum átti hon onkursvegna part í, og yvirhøvur tóktust hon frá byrjan at vera tann leikarin, sum Stjørnan skuldi seta álitið á, um tað skuldi eydnast teimum at vinna seg í finaludystin.

Yvirhøvur leikaði tó javnt á, men eftir knappar 10 minuttir fekk ein kanska fyrsta varhugan av, at tað kundi gerast meira enn trupult hjá Stjørnuni at lyfta stóru uppgávuna.

VB fekk tvær av leikarum sínum blakaðar av vøllinum, men í teimum báðum fylgjandi minuttum megnaði Stjørnan als ikki at gera nakað mál. Tríggjar ferðir hesa løtuna høvdu tær møguleika at fara í skjótt álop, men hvørja ferð varð bólturin tveittur burtur, tí tær ikki gjørdu sær nóg stóran ómak við sendingini.

Tað skuldi eisini vísa seg, at hesar óneyvu sendingarnar ikki vóru nakað serstakt fyribrigdi. Fyrri hálvleikur var allur sum hann var merktur av hesum, og at Stjørnan ikki kundi fara til hálvleiks við eini leiðslu, kunnu tær bert takka sær sjálvum fyri. Í øllum førum 10 møguleikar til skjótálop vórðu soleiðis søplaðir burtur, og ístaðin gav hetta VB nógv størri trúgv uppá, at tær skuldu vinna samlaðu uppgerðina.

### Mansverjan

Ein av høvuðsorsøkunum til, at tað eydnaðist somikið væl hjá VB at halda fast hesa ferð var, at tær heilt greitt høvdu lært av mistøkunum frá undanfarna vikuskifti.

Tá leiktu tær tveir dystir móti Stjørnuni, í báðum teirra nýtti Stjørnan eitt sera einfalt vápn, tá mest leikaði á. Tær mansvardu tær báðar útlendsku hjá VB, og hetta viðførdi eisini, at tær komu so nøkunlunda heilskapaðar ígjøgnum vikuskiftið. Í fyrru hálvfinaluni viðførdi hetta, at VB leiðslan minkaði úr 11 niður í fimm mál, og í landskappingardystinum dagin eftir megnaðu tær við hesum at koppa dystinum á høvdið, at avgera alt til egnan fyrimun í seinastu sekundunum.

Í Klaksvík fóru tær eisini undir at nýta hetta vápnið longu eftir 20 minuttum, men hetta var sum við barnasøguni um Petur og úlvin. Tær báðar fyrstu ferðirnar riggaði tað hjá Peturi at lumpa bygdarfólkið, men tá tað av álva stóð, var eingin, sum trúði honum.

At byrja við tóktist mansvejan av Reginu og Andreu at órógva VB, men skjótt gjørdist greitt, at tær høvdu roknað við hesum.

Restin av liðnum – serstakliga Laila Jespersen og Christina Holm – tóku tá alt meira yvir, og eisini dugdi Margret Augustinussen sera væl at gera sær dælt av nógva plássinum, sum stóðst av, nú tær spældu fýra móti fýra. Tað skal eisini leggjast afturat, at tær báðar útlendsku als ikki duttu burtur, hóast mansverjuna. Eitt nú megnaði Andrea kortini at gerast toppskjútti, og sigur hetta eisini eitt sindur av tær dygdir, ið hon sum leikari hevur.

Mansverjuna helt Stjørnan annars fast um allan dystin, men tað gjørdist alt meira eyðsæð, at tað ikki skuldi verða hendan, sum fór at tryggja teimum sigurin.

### Stórskjútti uttan mál

Ein annar av trumfunum hjá Stjørnuni vísti seg heldur ikki at rigga sunudagin. Simona Dziugyte var toppskjútti í landskappingini, tá hon undan ársskiftinum flutti úr Sóljuni til Stjørnuna, men siðani hetta, hevur hon ikki gjørt so nógv um seg.

Ikki tí, leiklutur hennara er sjálvsagt minni eyðsýndur á Stjørnu-liðnum, men tað kann koritni undra, at somikið lítið kemur burtur úr nú. Hesa ferð varð hon hildin á beinkinum meginpartin av fyrstu trimum korterunum, og tá hon kom inn, megnaði hon so heldur ikki at skapa tað undrið, sum Stjørnan tá hevði tørv á.

### Áhugaverd finala

Nú tær vóru aftan fyri við seks málum samanlagt, tá seinni hálvleikur byrjaði, merkti eisini, at seinastu 30 minuttirnir gjørdust ein kapprenning við tíðina hjá Stjørnuni. Tær byrjaðu seinna hálvleikin væl, og eina løtu hóttu tær eisini við at fara avstað.

Tær vunnu seg tvey mál framum, men so endurtók søgan seg aftur. Nakrir óneyðugir bóltar vórðu tveittir burtur, og so var VB aftur frammanfyri.

Seinasta korterið ella so tóktist eisini, sum um tær á heimaliðnum ásannaðu, at slagið var tapt. Roynt varð nú eisini við mansverju av Lailu Jespersen, men einki hjálpti. VB hevði allar trumfir á hondini, og seinasta løtan varð bert ein staðfesting av, at tær nú aftur eru í finaluni. Tað vóru tær eisini í fjør, men tá máttu tær lúta fyri Kyndli. Hesaferð verður setningurin VÍF, og nógv bendir á, at talan her kann gerast um eina sera áhugaverda uppgerð.

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
Stjørnan: Vesna Tomajek 11(7), Joan M. Joensen 5, Annika Ljósstein 3, Anna K. Samson 3, Sólvá Eystberg 1
VB: Andrea Lütz 10(2), Margret Augustinussen 5, Regina Radó 5, Laila Jespersen 3, Mary Krosslá 1, Christina Holm 1
Brotskøst: Stjørnan 9, VB 3
Útvísingar: Stjørnan 5, VB 3
Dómarar úr Neistanum:
Hjalmar Petersen og Kristian Johansen. Stýrdu dystinum við myndugleika, og løgdu eina harða linju beinanvegin.



VÍF-H71 31-25 (21-10)

# Avgreiðsluspurningur

**Nakran serliga spennandi dyst fingu fáu áskoðarnir í Vestmanna so avgjørt ikki, tá H71 vitjaði sunnudagin. Til tess var styrkismunurin millum liðini alt ov stórur**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Kanska høvdu hoyvíkingar vónað, at teir kundu gera ein vørr í Vestmanna sunnudagin. Í øllum førum hevur H71 verið eitt av liðunum, sum hevur havt hampuliga gott tak á VÍF, men soleiðis gjørdist ongantíð sunndagin.

### Lupu avstað

VÍF verjan riggaði frá fyrsta bríksli, og við útgangsstøði í hesu, saman við góðum málmansspæli frá Eli, læsti heimaliðið dyrnar beinanvegin. Tá hoyvíkingar endiliga sluppu upp á talvuna, hevði VÍF longu skorað sjey ferðir, og so var hesin dysturin líka sum avgjørdur.

Um tað var orsakað av dygdunum hjá vestmenningum, ella um hoyvíkingar als onga vón høvdu um at vinna dystin, skal ikki sigast nakað um her. Allar helst var talan um eina blanding av báðum, men undir øllum umstøðum var talan hesa fyrstu løtuna um einvegis ferðslu. Tað sá til tíðir undarliga lætt út hjá vestmenningum at økja um leiðsluna. Ferðin á spælinum var ikki hins stóra, men uttan stórvegis trupulleikar kundu teir í fleiri førum skjóta upp um hoyvíkingarnar, so bólturin aftur kundi spíla meskarnar.

### Róligari

Eftir at farið var um miðjuna av fyrra hálvleiki, var tað sum um vestmenningarnir vóru nøgdir um leiðsluna, sum teir høvdu fingið. Kanska mundu tankarnir eisini fara at leita fram til komandi leygardag, tá steypafinalan móti StÍF stendur á skránni.

Hoyvíkingar sluppu nú eisini upp í part at spæla. Í verjuni vórðu teir ikki eins væl ansaðir, og hetta viðførdi so eisini, at atkomumøguleikarnir til skotini betraðust, soleiðis at tað ikki altíð var eins lætt hjá Eli í málinum at verja fyri. Serliga fyrstu løtuna av seinna hálvleiki innibar hetta, at leiðslan hjá heimaliðnum minkaði.

Tað eydnaðist tó vestmenningunum at taka seg eitt sindur saman aftur, og tá teir so øktu leiðsluna upp aftur í 10 mál, var allur ivi beindur av vegnum.

### Langt fremstir

Við sigrinum syrgdu vestmenningar fyri, at teir framvegis hava fult stigatal ovast á máltalvuni. Í løtuni er eisini ilt at síggja, hvat lið skal gera nakað sum helst fyri at broyta upp á hetta, og eisini er ilt at ímynda sær, at strandingar kunnu seta nakrar forðingar av týdningi fyri, tá liðini fara at dystast um C ocacola steypið leygardagin.

At Ingi Olsen ikki var við hesaferð merkti ikki avrikið nakað serligt, men hinvegin prógvaði tað, at VÍF í ár er sera væl fyri við bakspælarum. Áki leikti allan dystin á miðplássinum, og sum vanligt, so lá hansara lutur ikki eftir, tá skjótast skuldi. Afturat sær hevði hann so teir báðar risarnar, Sámal og Danut, sum hvør í sínum lag hava eina ræðandi skotstyrki. Hædd teirra kemur teimum eisini til góðar í verjupartinum, og er Sjúrður tá eisini partur av livandi múrinum, sum uttan iva er hægsta verjan í Føroyum.

### Tekur tíð

Fyri Hoyvík kann dysturin sum so bert nýast sum staðfesting av, at tað enn er langt á mál, áðrenn teir aftur fara at røkka upp móti ovastu føroysku hondbóltstindunum.

Heilt uttan møguleikar er liðið tó ikki. Flestu spælararnir eiga enn nógv góð ár fyri framman, og við eitt sindur av styrki uttan ífrá kann talan gerast um eitt lið, sum aftur fer at bíta frá sær. Enn mugu teir tó sláa seg til tols við, at tað er langur vegur upp, eins og flestu av hini í landinum mugu gera í hesum døgum. VÍF er nevnliga so nógv tað besta liðið í landinum í løtuni.

### Dysturin í tølum

*Málskjúttar:*
*VÍF:* Áki Olsen 9(4), Sámal Joensen 5(1), Martin Hummeland 5, Jahn Zachariasen 4, Danut Negro 3, Rógvi Nielsen 2, Harald Bjørgvin 2, Sjúrður Holm 1
*H71:* Halgir Dahl Olesen 8(1), Johnny Durhuus 6, Hallur Danielsen 3, Rolf Mouritsen 2, Rene Dahl Olesen 2(1), Anfinn N. Debes 2(1), Agnar Højgaard 1, Olaf Vestergaard 1

*Brotskøst:* VÍF 6, H71 5
*Útvísingar:* VÍF 2, H71 6
*Diskvalifikatión:*
H71 1(3X2 minuttir)
*Dómarar úr Stjørnuni:*
Geir Wardum og Carsten Andersen. Høvdu ein sera friðarligan dag, har tað ikki var neyðugt við at gera nakra serliga nýtslu av heimildunum, sum dómarar hava.



*Fyrstu løtuna av dystinum avgjørdu VÍF at kalla alt, og Egin Høgnesen í H71 málinum kundi lítið annað gera, enn at rekja bóltarnar úr aftur meskunum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Vesna Tomajek hevði ábyrgdina av liðnum, tá Stjørnan spældi móti Sóljuni* *Savnsmynd*

# Stjørnan lætt spæl

**Klassamunur var á liðunum báðum, tá verandi meistararnir úr Klaksvík og nýuppflutta Sóljan dystaðust á Giljanesi**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Ikki kundi roknast við, at Sóljan skuldi fara at gera tað stóra við Stjørnuna, tá liðini hittust sunnudagin.

Soleiðis varð heldur ikki, og í roynd og veru var sjáldan spenningur um úrslitið.

– Tær eru nokk ein klassa omanfyri okkum, so tað skuldi helst eisini verið talan um ein tryggan sigur, helt Albert Ellefsen, sum í ár er við til at venja Sóljuna.

– Málið hjá okkum er so heldur ikki at blanda okkum í oddin. Vit skulu halda sætið í deildini, og hetta í sjálvum sær verður ein sera torfør uppgáva. Liðið hjá okkum er sera ungt, og enn resta nógvar royndir í, sigur Albert. Hann vísir í hesum sambandi á, at meginparturin av liðnum er úr 21 ár og niðureftir, og at tann yngsta á liðnum ikki er meira enn 15 ár.

– Hetta er ikki meira enn eitt styrkt unglingalið, og tá eigur munur at vera á, sigur Albert Ellefsen at enda.

### Bara øktu

Um dystin sjálvan er annars ikki so nógv at siga. Fyrstu løtuna fylgdust liðin í málskjóting. Frá støðuni 5-7, tók Stjørnan so dik á seg, og fór upp á 6-13. Eftir hetta var talan bert um ein spurning at fáa tíðina at ganga, og Stjørnan bara økti javnt og samt um leiðsluna.

Fyri Stjørnuna var tað helst fløvandi at enda rokmilku vikuna við einum tryggum sigri, men spurningurin er so bert, hvørja nyttu hesin ger. Gullið man í øllum førum vera gloppið teimum av hondum, eins og tær heldur ikki hava møguleikan at vinna steypakappingina.

### Dysturin í tølum:

*Málskjúttar:*
*Sóljan:* Marjun Jørgensen 5(1), Hertha Simonsen 4, Heidi Haraldsen 2, Heidi Marita Akselsen 2, Sólja Nielsen 1, Jóna Gudmundsen 1, Fía Selma Nielsen 1
*Stjørnan:* Annika Ljósstein 11(2), Joan M. Joensen 4(2), Anna Kristina Samson 4, Una Olsen 3, Simona Dziugyte 3, Sólvá Eystberg 3(1),Vesna Tomajek 1
*Brotskøst:* Sóljan 2, Stjørnan 7
*Útvísingar:* Sóljan 1
*Dómarar úr StÍF:*
Jón Rasmussen og Alexandur Johansen